**Til**

**Løgmansskrivstovuna**
**Uttanríkis- og Vinnumálaráðið**

**Hoyringssvar til lógaruppskot viðvíkjandi yvirtøku av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk**

Umhvørvisstovan takkar fyri høvið og hevur hesar viðmerkingar:

**1) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (LMS)**

Hildið verður ikki, at tað er vanligt lógarmál at brúka hugtakið "ólógásettum" grundarlagi í broti 1.2. Týðiligari er at siga á ikki lógásettum grundarlagi, ella at ongin lóggáva er galdandi fyri málsøkini el.a.

Í broti 1.3 2. reglubrot eru klombur og spurningurin er, um hesar ikki skulu strikast og óvissan ruddast burtur?

Har verður eisini víst til "onnur sjómerki" og spurt verður, um tað tøkniliga finnast fleiri sløg av sjómerkjum?

Í triðjsíðsta reglubroti verður víst til økið um "bjarging av skipsrovum v.m.", sum eisini verður yvirtikið. Umhvørvisstovan ger vart við, at hesi skip við yvirtøkuni eru fevnd av umsitingarøkinum "trygd á sjónum" og ikki "umhvørvismál".

Til brot 1.4 restar Umhvørvisstovan á yvirlitinum yvir stovnar, sum hava fingið uppskotið í almenna hoyring.

Til brot 2.2 er spurningurin um málsøkið skal leggjast til Sjóvinnustýrið ella til Vørn ikki avgreiddur. Eru samráðingar í landsstýrinum um spurningin? Tað hevur eitt nú týdning fyri komandi kortmyndugleikan at vita, hvønn stovn samstarvast skal við á sjóuppmerkingar- og vitaverksøkinum.

**2) Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum (UVMR)**

Til § 1 verður spurt, um tað er við vilja, at orðið vitar ella vitaverk als ikki er nevnt, men bara siglingarskipanir og sjóuppmerkingar? Er tað kanska tí, at ætlanin ikki er at lógarregulera økið yvirhøvur ella er onnur orsøk?

Spurt verður eisini, um hugtakið "sjóuppmerking" framhaldandi fer at verða kalla soleiðis, ella um tað longu við hesi lóggávu kundi verið skilagott at funnið eitt orð ella heitið, sum er meira nýmótans og sum eitt nú ikki er í vanda fyri at koma í bland við hugtøk sum sjóuppmáting, sum

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · us@us.fo · www.us.fo

liggur í málsøkinum um yvirtøku av kortmyndugleika? Í øðrum lagi verður spurt, um til ber at skilmarka ella avmarka hugtakið?

Hildið verður ikki, at tað er vanligt lógarmál at brúka hugtakið “ólógásettum” grundarlagi í broti 1.2. Týðiligari er at siga á ikki lógásettum grundarlagi, ella at ongin lóggáva er galdandi fyri málsøkini el.a.

Til brot 1.3 verður spurt, hví vitaverk verður nevnt sum í setninginum um “at fyrireika føroyska lóggávu til yvirtøku av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk”, tá “vitaverk” ikki er nevnt í sjálvari lógásetingini í § 1, sí uppskot til orðing av § 31a?

Til brot 1.4 verður spurt, hvat skiljast skal við “neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar”? Er her talan um ásetan av siglingarleiðum og uppsetan av sjómerkjum fyri at geva skipaferðsluni álítandi leiðbeining, so tey kunnu sigla trygt millum oyggjarnar?

Í øðrum reglubroti verður víst til “føroyskum sjóuppmerkingarøki” uttan yvirhøvur at nágreina tað. Er hetta eitt serstakt øki, føroyska sjóumveldið ella alt sjó- og fiskivinnuøkið? Og hvar gongur markið millum ábyrgdina hjá landinum og ábyrgdina hjá kommununum í mun til havnir, redir, bátabylar, molar o.a.m.?

Í síðsta reglubrotið verður spurt, hví Landsverk ikki skal umsita vitar og bústaðir?

Til brot 1.5 er Umhvørvisstovan ikki nevnd sum hoyringspartur.

Til 2.2 verður sagt, at “ætlandi yvirtekur Sjóvinnustýrið uppgávurnar hjá Søfartsstyrelsen, heruppií útgávu av nautiskum ritum og altjóða samstarvi.” Hóskandi er at nevna, hvørji rit talan er um, eitt nú “Efterretninger for Søfarende”, o.o.

Í sama reglubroti verður víst til samskipandi uppgávurnar og har verður spurt, um komandi føroyski kortmyndugleikin ikki eisini eigur at verða við í uppreksanini?

Til 2.7 verður í øðrum reglubrotið nevnt nakað um “at stovna sjóuppmerkingar” og spurt verður, hvussu hetta verður gjørt, hvar nýggjar sjóuppmerkingar verða løggildaðar og um setningurin kann skrivast á ein meira skilligan hátt? Kanska UVMR ella SVS kundu umhugsa at brúkt eitt meira framtíðartryggja hugtak?

Til 3.1 og undir til § 1 verður í fyrsta reglubroti aftur “í føroyskum sjóuppmerkingarøki” brúkt. Spurt verður, hvussu hetta verður eyðmerkt? Vit hava jú mark uppat fleiri grannalondum og altjóða sjógvi umframt inn móti kommunum.

Petur Nielsen, stjóri